## Blásti lív í Labour

Bretski arbeiðaraflokkurin Labour heldur ársfund í Brighton í hesum døgum, og í gjárkvøldið var formaðurin í norska Arbeiðaraflokkinum, Jens Stoltenberg, gestarøðari. Ætlanin var, at hann skuldi tosa um veðurlagsbroytingarnar, og tað gjørdi hann eisini. Men tað, sum serliga vakti ans, var, tá hann royndi at sannføra fundarfólkið um, at Labour kann vinna valið næsta ár, hóast meiningakanningarnar nú siga nakað heilt annað. Hann ásannaði, at arbeiðaraflokkurin hevði tapt í Týsklandi, men í Noregi og Portugal vann hann, og tað sama fer at henda í Grikkalandi um eina viku og í Bretlandi næsta ár, segði Jens Stoltenberg.




## Íslendingar ótolnast

Íslendska stjórnin er um at missa tolið við Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF. Jóhanna Sigurðardóttur, forsætisráðharri, sigur við tíðindatænastuna Bloomberg, Grunnurin hevur sagt, at hann skal endurskoða sína tilsøgn um at læna íslendingum meiri pening, men íslendingar halda, at grunnurin hevur brúkt órímiliga langa tíð til tað arbeiðið. Jóhanna Sigurðardóttur sigur við Bloomberg, at íslendska stjórnin vónar, at IMF fer at taka endaliga avgerð í oktober. Tí íslendingar kunnu ikki bíða longur, sigur hon.

## Vilja knýta vinasamband millum politikarar

**Við hesum tiltakinum, vóna vit at fremja altjóða samstarv, sigur russiska Duman í innbjóðing til Løgtingið um at vera við í ítróttarkapping í Moskva**

EM FYRI TINGLIMIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

-Vit vóna við hesum tiltakinum at fremja altjóða samstarv og at knýta vinasambond ímillum tinglimir úr Evropa.

Tað sigur russiska Duman í innbjóðingini til Føroya Løting um at koma til Russlands at vera við í fyrstu ítróttarkappingini ímillum ting í Evropa og sum tað ber til at lesa um í greinini omanfyri.

Tað er ítrótturin, sum skal vera snúningspunktið og kappast verður í fimm ítróttargreinum: Innandurafótbólti, tennis og borðtennis, talvi og golf.

Og tað verða yrkisdómarar í øllum kappingum og kappingarnar verða á bestu ítróttarvøllum í Moskva

Harafturat verður skipa fyri fólkaheilsurenning fyri allar luttakararnar.

Men skipað verður eisini fyri útferðum til søvn, leikhús og onnur áhugaverd støð í Moskva og tað býðst eisini høvi til at hitta umboð fyri russisku stjórnina og býarstýri í Moskva.

# Løgtingslimir ætla at fella russisku bjørnina

**Løgtingslimir hildu tað vera skemt, tá ið russiska Duman nú ein dagin bjóðaði Løgtinginum av at spæla fótbólt. Men tað var alt annað enn skemt og nú hava politikarar hug at taka av**

EM FYRI TINGLIMIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Í fyrstuni hildu vit, at tað var skemt.

Tað sigur John Johannessen, næstformaður í Løgtinginum, tá ið Løgtingið nú ein dagin fekk teldupost við eini innbjóðing frá russiska tinginum um at koma til Moskva at kappast í ítrótti.

- Men síðani hava vit kannað tað og tað var altso ikki skemt, leggur hann afturat.

Tað er russiska tingið, Duman, sum hevur bjóðað tinglimum úr flestu londum í Evropa at koma til Russlands at vera við í eini ítróttarkapping fyri tinglimir.

Kappingin byrjar longu hósdagin og endar mánadagin. Samstundis kann tað vera nokk so tvørligt við innferðarloyvum til Russlands, so John Johannessen ásannar, at avgerðin skal takast skjótt.

Og tað er eisini ætlanin at taka eina skjóta avgerð, so tey fara at brúka dagin í dag at kanna møguleikarnar fyri at vera við og vónand kann ein avgerð takast longu seinni í dag.

Hinvegin ásannar hann, at tað eru nakrir løgtingslimir, sum eru áhugaðir at fara.

Sjálvur hevði hann verið fúsir at farið, men harumframt hava eisini Karsten Hansen, Kári P. Højgaard, Hans Pauli Strøm, Eyðgunn Samuelsen og Helgi Abrahamsen víst áhuga fyri ferðini.



*Føroyskir politikarar hava hug at taka av eini innbjóðing úr Moskva at vera við í eini óformligari EM kapping fyri tinglimir*

Tað er nógvur ymiskur ítróttur á skránni, men tað, sum løgtingslimirnir hugsa mest um, er at manna eitt lið til innandura fótbóltskappingina, sum er á skránni.

- Tað hevði ikki órógvað løgtingsarbeiðið at farið avstað, tí vit fara eftir at fíggjarlógin fyri 2010 er løgd fram og koma aftur áðrenn hon kemur til viðgerðar í Løgtinginum, sigur næstformaðurin í Løgtinginum.

Hann vísur eisini, at hetta hevði ikki kostað landskassanum eitt oyra, tí russarar betala alla ferðina, sum hon er, eisini gisting.

### Gott at hittast

John Johannessen sigur, at hetta er fyrstu ferð, at stig verður tikið til at savna tinglimir úr øllum Evropa til óformliga samveru av hesum slagi.

- Samstundis er hetta eisini eitt slag fyri fólkaheilsuna, leggur hann afturat.

Men tað er ikki bara fjant og fjas á skránni, tí að verður eisini rúm fyri fundum ímillum politikarar.

- Av tí, at eg eri formaður í føroysku uttanlandsnevndini, fái eg eisini høvi til at hitta formannin í russisku uttanlandsnevndini og vit fáa eisini høvi til at hitta borgarstjóran í Moskva og aðrar politikarar.

- Hetta er eitt sjáldsamt, men fínt høvi til at hitta politikarar og til at knýta politisk sambond við tinglimir úr øðrum londum undir meiri óformligum umstøðum, sigur John Johannessen.

Hann sigur, at tað er altíð gott at hitta politikarar úr øðrum londum, at tosa við teir um ymisk mál og at knýta persónlig sambond.

- Og áðrenn tú veitst av, kann tað vera hent at hava knýtt sambond við politikarar úr øðrum londum.

- Hóast londini eru ógvuliga ymiskt, hava vit eisini nógvar felags avbjóðingar og tað kann avgjørt verða hent at hitta politikarar úr ymsum londum og hoyra um teirra royndir og áskoðanir, leggur hann afturat.

Tel. 21 73 66 & 50 82 34
steinbjorn@dali.fo

RÁÐGEVING & TÆNASTUR
til virkisleiðslur innan:

- Fíggjarstýring
- Rakstrarætlan
- Bókhald og MVG-uppgerð
- Prosjektleiðslu
- Marknaðarkanningar
- Kundakanningar

Vit hava meira enn 30 ára royndir innan tær tænastur vit bjóða, bæði frá privata vinnulívinum og tí almenna sektorinum

DALI Consulting Sp/f